# Føroyar brúk fyri útflutningsráð

**ALTJÓÐA MESSUR** Oljuvinnufelagið heitir á myndugleikarnar um, saman við vinnuni, at meta um møguleikarnar at endurskipa eitt útflutningsráð, sum verður skipað í samstarvi millum vinnuna og tað almenna.

Jan Müller

Útmeldingar í seinastuni frá almennari síðu um, at pengar eru ikki til at marknaðarføra Føroyar og føroyskar vørur í útlandinum hava nú fingið Oljuvinnufelagið at taka blaðið frá munninum. Felagið, sum ger eitt stórt arbeiði fyri at førleikamenna føroyska vinnu til eina møguliga komandi oljuvinnu, hevur sent uttanríkisráðnum og vinnumálaráðnum eina umbøn um at fáa vent gongdini aftur.

Oljuvinnufelagið fegnat tó um, at umstøðurnar hesuferð lagaðu seg soleiðis, at tað ber til at hava ein landabás á Offshore Europe 2011. Oljuvinnufelagið ynskir sjálvsagt at vera við til at samskipa landabásin, og fer eisini at gera sítt til, at básurin og luttøkan gerast væleydnað. Og víðari verður sagt:

– At føroyski landabásurin á Offshore Europe E2011 mestsum av misgávum verður fíggjaður av Uttanríkisráðnum loysir tó ikki teir trupulleikar, sum eru knýttir at messuluttøkum uttanlands frameftir. Sum kunnugt hevur Vinnuframagrunnurin avgjørt ikki at stuðla tílíkum messum longur, men heldur leggja seg eftir at stuðla íverksetarum.

Tær føroysku fyritøkur, sum luttaka á oljumessum, eru pinkulítlar at sammeta við aðrar fyritøkur á tílíkum messum, hóast lutfalsliga stórar heima í Føroyum. Gólvøkini er sera dýr at leiga, og harafturat eru básirnir dýrir at byggja. Tað er sum so rættuliga tilforlátiligt at siga, at vinnan skal gjalda kostnaðin av bási og av egnari luttøku á tílíkum messum, men hetta er tó ikki so einkult.

Tað er sera tungt hjá hesum í heimshøpi smáu fyritøkum at fara út um landoddarnar og marknaðarføra seg, men í felag lyfta tær munandi betur, og tiltøkini við landabásum eru sera stimbrandi fyri vinnuna. Skipanin higartil, við at Vinnuframagrunnurin hevur stuðlað við gólvøkinum, og básluttakararnir í felag goldið fyri básbygging og luttøku, hevur virkað væl.

Hesir básir vísa ikki bara Føroyar sum oljuvinnuland, men eisini sum eitt land, sum er vert at leggja merki til í heila tikið. Tað er tí av týdningi, ikki bara fyri Oljuvinnufelagið, men eisini fyri almennu Føroyar, at ein føroyskur landabásur er fastur partur av oljumessunum um okkara leiðir stendur í áheitina frá Oljuvinnufelagið. Og hildið verður fram:



*Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum heitir staðiliga á myndugleikarnar at halda fram við at stuðla vinnuni, tá hon luttekur á altjóða messum.*

Leikluturin hjá fyrst Menningarstovuni, síðan Samvit og nú Uttanríkisráðnum er týdningarmikil. Hesin parturin av messuluttøkunum má ikki detta burtur. Oljuvinnufelagið heitir tí á myndugleikarnar um, saman við vinnuni, at meta um møguleikarnar at endurskipa eitt útflutningsráð, sum verður skipað í samstarvi millum vinnuna og tað almenna.

Meðan hetta arbeiði verður gjørt, vónar Oljuvinnufelagið, at dentur verður lagdur á at fremja føroyska útrás, sum kann vaksa um útflutning av vørum og tænastum.

Oljuvinnufelagið heitir tí staðiliga á myndugleikarnar um framhaldandi at stuðla føroyskari útrás og landabásum frameftir. Formaður í felagnum er Magni Arge.

jan@sosialurin.fo



*Føroyar hava luttikið á mongum oljumessu í útlandinum fyri at fáa samband við útlendkar fyritøkur í hesi vinnuni*

# Grønt ljós í Tinganesi fyri oljumessu

**Føroyar hava luttikið á mongum oljumessu í útlandinum fyri at fáa samband við útlendskar fyritøkur í hesi vinnuni**

Jan Müller

Eftir nógvar atfinningar móti Uttanríkisráðnum fyri ikki at vilja stuðla føroyskari luttøku á eitt nú oljumessum í útlandinum vísir tað seg nú kortini, at Føroyar fara at hava ein bás á stóru altjóða oljumessuni í Aberdeen í heyst. Eftir at Uttanríkisráðið í fjør bílegði ein bás á oljumessuni hava fleiri føroyskar fyritøkur víst áhuga fyri at vera við, eitt nú Atlantic Airways, Atlantic Supplybase, Runavíkar Havn og Føroya Tele. Harumframt hava fleiri aðrar fyritøkur sagt seg vilja umhugsa luttøku.

Lív Lamhauge frá Uttanríkisráðnum sigur við Portalin, at áhugin fyri at luttaka er so mikið stórur, at Føroyar verða við á Offshore Europe í Aberdeen í september. Føroyar hava luttikið á flest øllum oljumessum, sum hava verið í Stavanger og Aberdeen seinastu 15-20 árini, tó við onkrum undantaki, eitt nú oljumessuni í Norra í fjør.

Spurningurin er sjálvandi, hvat føroyskar fyritøkur fáa burtur úr slíkari luttøku, nú eingin olja enn er funnin í Føroyum. Her meta fleiri umboð fyri vinnulívið, at tað er sera umráðandi at vera uppá forkant við gongdina. Skuldi eitt fund verið gjørt, so letur tað upp hurðar fyri einum útviklingi hjá føroyskum vinnulívi, og tí er umráðandi at vera fyrireikaður við góðum netverki og kontaktum.

Sum skilst er enn møguleiki at tekna luttøku á oljumessuni. Lív Lamhauge frá Uttanríkisráðnum sigur við Portalin, at eru fyritøkur, sum ynskja at vera við, kunnu tær venda sær til Uttanríkisráðið í seinasta lagi mánadagin.

Hóast eingi lønandi fund eru gjørd á landgrunninum, so livir framvegis vónin um, at tað ein dag verða funnið kolvetni í føroysku undirgrundini. Oljufundini beint hinumegin markið eru so nógv, at tað skal meira enn gandur til, um ikki eisini kolvetni eru føroysku megin markið siga keldur í oljuheiminum. Amerikanska oljufelagið Amerada Hess hevur júst leigað boriskipið Stena Carron til at bora enn ein metingarbrunn á Cambokelduni, sum liggur tætt upp at føroyska markinum. Hesin brunnurin verður boraður í mai. Um somu tíð verður seinasta hond løgd á boringina av Lagavulin brunninum har norðuri. Aftrat hesum verður ruddað slóð fyri enn eini útbygging av risastóru Clair-oljukelduni, sum varð funnin í 1977, umframt at Total hevur tikið stig til at fáa fyrstu gasskelduna vestan fyri Hetland í gongd.

Aftrat hesum verður bíðað í spenningi eftir avgerðini hjá Statoil, sum helst fer at bora á landgrunninum í summar.

jan@sosialurin.fo